# FCK styrkir hópin

**Felagið hjá Toda Jónsson, FC København, hevur styrkt hópin við tveimum nýggjum leikarum. Talan er um verjuleikaran Martin Albrechtsen og norska miðvallaran Erik Mykland**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Todi og Zuma hava fingið fleiri nýggjar liðfelagar í vetrarsteðginum. Teir hava tó eisini mist nakrar av stuðulsleikarunum. Nú elta teir Brøndby, sum tó neyvan verður at fanga*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir at fleiri leikarar hava leitað sær burtur úr FCK, er høvuðsstaðarfelagið farið undir at styrkja hópin við nýggjum leikarum.

Tann seinasti nýggi leikarin er Martin Albrechtsen. Hann er verjuleikari og varð keyptur frá grannunum í AB, sum var komið í penganeyð og mátti selja leikarar fyri at halda tørn.

Martin Albrechtsen er bara 21 ára gamal, men hevur longu spælt á danska landsliðnum. Hann verður mettur sum eitt tað størsta talentið í donskum fótbólti í løtuni. Okkurt evropeiskt stórfelag fer óivað at dyrgja eftir honum seinni.

FCK vil ikki upplýsa prísin fyri verjuleikaran, men Ekstrablaðið vil vera við, at AB fær 9 milliónir krónur fyri Albrechtsen. AB fær eisini 10%, um FCK selur hann til annað felag.

Albrechtsen skal vera avloysari hjá Jacob Laursen, ið skifti til Leicester í seinastu viku.

Umframt Albrechtsen er ein annar verjuleikari eisini byrjaður í felagnum. Talan er um Bora Zivkovic, sum er komin úr Silkeborg. Felagið hevur gjørt avtalu við leikaran fyri langari tíð síðani, men hann hevur enn ikki spælt sín fyrsta dyst fyri FCK.

Í blaðnum í gjár varð nevnt, at FCK eisini hevur keypt 30 ára gamla norðmannin Erik Mykland. Hesin leikarin er royndur á landsliðnum og hevur spælt við 1860 München, áðrenn hann bleiv ósamdur við venjaran, sum tí fegin vildi sleppa av við Mykland.

Tað tykist tí sum FCK av álvara hevur styrkt sær hópin eftir at Jacob Laursen, Thomas Rytter, Thomas Thorninger og Christian Poulsen hava gjørt avtalu við útlendsk feløg.

Tað seinasta nýggja er, at Niclas Jensen eisini er á veg burtur. Danskir fjølmiðlar siga í dag, at hann hevur gjørt avtalu við enska felagið Manchester City. FCK hevur einki ímóti at selja leikaran nú, tí í summar er sáttmálaskeiðið runnið, og hann vil ikki gera nýggjan sáttmála.

### Góður trupulleiki

Eingin ivi er nú um, at hóast FCK hevur mist fleiri leikarar, so hevur felagið fingið avbera góðar avloysarar ístaðin.

Venjarin Hans Backe hevur eitt sterkan hóp at ráða yvir, og í fleiri førum hevur hann ov nógvar góðar leikarar at velja ímillum.

Venjarin hevur latið orð falla um, at Todi Jónsson kanska verður fluttur út á vinstra vong, nú hann er klárur aftur. Orsøkin til hetta er, at liðið hevur ov nógvar áleyparar. Tí verður pláss gjørt fyri Toda longri afturi á vøllinum.

Tó hevur venjarin ikki tikið støðu til, hvussu hann fer at seta liðið, nú so stór útskifting hevur verið í hópinum.

## Grand Prix á Kambsdali

Hetta vikuskiftið varð eitt umfar í Grand-Prix í badminton leikt í Ítróttarhøllini á Kamsdali.

Leikt varð í einmansleiki.

**Nøkur av úrslitunum vóru:**

| | | |
|---|---|---|
| **Gentur 11 ár:** | | |
| Nr. 1 | Hanna Elisa Óladóttir Arge | HBF |
| Nr. 2 | Agnas Olsen | HBF |
| **Gentur 13 ár:** | | |
| Nr. 1 | Óluva Bærentsen | ÍF |
| Nr. 2 | Brynhild Carlsson | HBF |
| **Gentur 15 ár:** | | |
| Nr. 1 | Ulla í Dávastovu | VÍF |
| Nr. 2 | Rannvá á Rógvi | VÍF |
| **Dreingir 11 ár:** | | |
| Nr. 1 | Bogi Reinert Petersen | ÍF |
| Nr. 2 | Ari Ellingsgaard | ÍF |
| **Dreingir 13 ár:** | | |
| Nr. 1 | Filip Gram | MBF |
| Nr. 2 | Reidar Luid | HBF |
| **Dreingir 15 ár:** | | |
| Nr. 1 | Niclas Eysturoy | HBF |
| Nr. 2 | Rógvi Poulsen | HBF |
| **Dreingir 18 ár:** | | |
| Nr. 1 | Høgni Madsen | ÍF |
| Nr. 2 | Sverri Ellingsgaard | ÍF |
| **Kvinnur:** | | |
| Nr. 1 | Ingun Hansen | Strálan |
| Nr. 2 | Guri Poulsen | HBF |
| **Menn:** | | |
| Nr. 1 | Erland Poulsen | HBF |

# Óli Johannesen fær nýggjar liðfelagar

**Venjarin hjá Óla Johannesen í Hvidovre, Jan Sørensen, hevur tryggjað sær verjuleikaran Jacob Just frá Farum. Samstundis eru aðrir leikarar eisini á veg til felagið**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



Hvidovre hevur kunngjørt, at felagið hevur gjørt sáttmála við verjuleikaran Jacob Just, sum kemur úr Farum. Hvidovre hevur havt eyguni eftir Jacob Just í longri tíð, og fleiri onnur feløg vóru um boðið. Umsíðir er tað eydnast teimum at lokka hann til felagið.

Jacob Just kann bæði spæla í verjuni og sum verjukendur miðvallari. Hann kann sostatt geva Óla Johannesen kapping um pláss á liðnum.

Venjarin leggur tó dent á, at kapping skal vera um plássini á liðnum. Heimasíðan hjá Hvidovre skrivar eisini, at Jan Sørensen hevur samráðingar við tríggjar aðrar leikarar, sum eru uppá tal.

Í næstu viku kemur ein svenskur leikari til felagið. Hann skal til royndarvenjing og sannføra venjaran um síni evni sum fótbóltsleikari.

Ein leikari er hinvegin á veg úr felagnum. Talan er um Sammy Youssouf, sum spælir á vinstra vongi. Hann er til royndarvenjing í St. Johnstone í Skotlandi. Youssouf er ein ógvuliga evnaríkur og vandamikil leikari.

St. Johnstone hevur tó ikki gjørt av, um felagið vil hava sáttmála við Sammy, men væntandi spyrst ein sáttmáli burturúr.

Annars eru leikararnir í Hvidovre farnir at venja aftur. Hesar fyrstu vikurnar verður dentur lagdur á ta kropsligu venjingina. Fyrsti dysturin í landskappingini eftir vetrarsteðgin verður móti B-1909, og hann verður spældur fyrst í mars mánaði.

# Gongur væl hjá Claus Bech Jørgensen

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Claus Bech Jørgensen, sum hevur familjubond í Føroyum, er komin á liðið hjá Bradford. Claus byrjaði inni fyri fyrstu ferð í enska felagnum, tá Bradford vann 3-1 á Portsmouth um vikuskiftið.

Hetta er fyrsta kappingarárið hjá Claus Bech Jørgensen í Bradford, sum í fjør flutti niður úr ensku Premier League. Áðrenn spældi hann við Bournemouth í ensku aðru deild.

Tað hevur tó ikki gingið eftir vil hjá Bradford, tí liðið liggur á 17. plássi. Tað er tó eingin loyna, at felagið miðar eftir at flyta uppaftur. Eingin spáddi liðnum nakran møguleika at standa seg í Premier League, men tað eydnaðist teimum at spæla í bestu deildini í tvey kappingarár.

Claus Bech Jørgensen spældi allan dystin leygardagin, og úrslitið var gott. Portsmouth legði seg framum, men Bradford svaraði aftur.

Tað má sigast, at hálvi føroyingurin hevur fingið navnframar liðfelagar. Eitt nú Lee Sharpe, sum hevur spælt við Manchester United og á enska landsliðnum, skoraði leygardagin. Vónandi fær Claus fleiri dystir í Bradford.



Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

## Skrivstovufólk
### til Hjálparmiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild av Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 8 fólk á HTM.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um**
- vanligt skrivstovuarbeiði
- journalisering
- móttøku og telefonavgreiðslu

**Vit sóknast eftir einum starvsfelag sum hevur:**
- útbúgving innan skrivstovuyrki
- drúgvar royndir á økinum
- góð samstarvsevnir
- góðan telduførleika
- kunnleika til journalisering (DocuLive) er ein fyrimunur
- kunnleika til C5

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- samskifti við viðskiftafólk

Løn og stanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á tlf. 318300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 22. januar 2002 kl. 14.00.

## Val av UMBOÐSRÁÐI
## fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

**Í februar mánaði ár 2002 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið Føroyar. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2002.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum.

**Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum.**

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, ið teknar øll sløg av skaðatryggingum. Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Umboðsráðið velur nevnd felagsins. Afturat hesum velja starvsfólkini í felagnum nevndarlimir sambært ta til eina og hvørja tíð verandi lóg um tryggingarvirksemi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavist 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni og øllum avgreiðslunum.

**Tórshavn, 14. januar 2002**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

SANSIR · TEL 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel+298 345600, Fax+298 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

## Jeepur til sølu



Fyri ein av kundum okkara, selja vit henda Suzuki Samurai 4x4, Prísur 50.000, aldur: juli 1995, koyrt: 48.500, litur: bláur.



**Spf. Eyðbjørn Hansen - Bilasøla**
tlf. 313375, fax 311495,
www.suzuki.fo – suzuki@suzuki.fo

## Elektrikari

søkist til
fjølbroytt arbeiði
hjá

EYÐUN JESPERSEN

Tlf. +298 314547 · Fax +298 319923
E-mail: pjej@post.olivant.fo

## Partabrøv til sølu

Vegna viðskiftafólk verða partabrøv í P/F Útferðr (skrá. nr. 2329) áljóðandi nom. kr. 35.000,00 hervið lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Ein og hvør søla er treytað av góðkenning frá nevnd felagsins.

Áhugað verða biðin um at venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
v/ Petur Even Djurhuus, adv.
Yviri við Strond 4
100 Tórshavn
Tlf. 311260